# Máltindarnir

## 1. deild

| | | |
|---|---|---|
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 9 |
| John Petersen | B36 | 8 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 7 |
| Andrew av Fløtum | HB | 7 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Birgir Jørgensen | VB | 6 |
| Milan Kulic | VB | 6 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Karsten From | HB | 5 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 5 |
| Jákup á Borg | B36 | 4 |
| John Heri Dam | B68 | 4 |
| Egil á Bø | EB/S | 4 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 4 |
| Ronnie Samuelsen | EB/S | 4 |
| Sorin Anghel | EB/S | 4 |
| Clayton Soares | FSV | 4 |
| Kim Poulsen | FSV | 4 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 4 |

## 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| Eirikur Joensen | Sumba | 8 |
| Símun Hansen | AB | 7 |
| Áki Mørk | B36 | 7 |
| Allan Michelsen | TB | 7 |
| Kaj Roest | TB | 7 |
| Eyðun Samuelsen | AB | 6 |
| Pætur Dam Jacobsen | AB | 5 |
| Hanus Eliasen | ÍF | 5 |
| Erling Fles | KÍ | 5 |
| Olgar Danielsen | KÍ | 5 |
| Dan Mortensen | TB | 5 |
| Rasmus Nolsøe | TB | 5 |
| Sigmundur Mikkelsen | VB | 5 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 4 |
| Ken Bærendsen | ÍF | 4 |
| Óli Johannesen | TB | 4 |
| Jón Pauli Olsen | VB | 4 |

# Støður

## 1. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 13 | 9 - 3 - 1 | 33 | 14 | 19 | 30 |
| 2 | B68 | 13 | 7 - 5 - 1 | 18 | 8 | 10 | 26 |
| 3 | B36 | 13 | 8 - 1 - 4 | 26 | 14 | 12 | 25 |
| 4 | NSÍ | 13 | 7 - 4 - 2 | 23 | 11 | 12 | 25 |
| 5 | KÍ | 13 | 6 - 2 - 5 | 16 | 20 | -4 | 20 |
| 6 | EB/Streymur | 13 | 5 - 4 - 4 | 24 | 25 | -1 | 19 |
| 7 | GÍ | 13 | 3 - 4 - 6 | 14 | 22 | -8 | 13 |
| 8 | VB | 13 | 3 - 3 - 7 | 15 | 24 | -9 | 12 |
| 9 | FS V | 13 | 2 - 2 - 9 | 18 | 32 | -14 | 8 |
| 10 | Skála | 13 | 1 - 0 - 12 | 8 | 25 | -17 | 3 |

## 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 12 | 9 - 2 - 1 | 23 | 8 | 15 | 29 |
| 2 | TB | 12 | 7 - 2 - 3 | 32 | 17 | 15 | 23 |
| 3 | Sumba | 12 | 6 - 4 - 2 | 24 | 10 | 14 | 22 |
| 4 | VB | 12 | 6 - 1 - 5 | 26 | 15 | 11 | 19 |
| 5 | KÍ | 12 | 6 - 1 - 5 | 26 | 33 | -7 | 19 |
| 6 | AB | 12 | 4 - 5 - 3 | 23 | 17 | 6 | 17 |
| 7 | B36 | 12 | 4 - 3 - 5 | 19 | 16 | 3 | 15 |
| 8 | LÍF | 12 | 3 - 1 - 8 | 14 | 35 | -21 | 10 |
| 9 | B71 | 12 | 2 - 2 - 8 | 16 | 20 | -4 | 8 |
| 10 | B68 | 12 | 2 - 1 - 9 | 7 | 39 | -32 | 7 |

B36–VB 2-1 (1-0):

# B36 slapp úr botninum



*B36 er nú um fóta sær í aðru deild, og leygardagin klintraðu teir við sigrinum á VB enn longur upp*

**Eftir eina soltna byrjan er havnarliðið í ferð at ríva seg leysan úr botnstríðnum eftir 2-1 sigurin í Gundadali á VB, sum við ósigrinum dragnaði í oddastríðnum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Úr hvør sínum enda á stigatalvuni nærkaðust bæði liðini miðjuni eftir dystin í góðveðrinum í Gundadali leygardagin. B36 fór úr botninum, meðan VB dragnaði í oddinum.

Endaliga úrslitið var 2-1 til B36, og samanumtikið var talan um eitt rættvíst úrslit.

### Góð B36 byrjan

B36 legði betri fyri og kom tíðliga á odda 1-0 . Karl Høgnesen gjørdist leysur við málverjanum, og eftir at hava roynt seg við skoti einaferð, kom bólturin aftur til Karl, sum í aðru syftu sendi bóltin upp í nettakið.

B36 hevði fleiri málmøguleikar at leggja seg á odda 2-0, har serliga Áki Mørk, sami Karl Høgnesen og Heini í Skorini kundu økt um munin. Heini í Skorini leikti sín fyrsta dyst í hálva annan mánað vegna skaða, men sami skaðin gjørdi so harðliga um seg aftur, at hann ikki verður tøkur aftur í ár.

VB kom mótvegis B36 sjáldan til stórar málmøguleikar fyri stegðin, og liðini fóru til hálvleiks við hesum eina B36 málinum.

### Perla frá Áka Mørk

B36 helt fram at skapa málmøguleikar, tá liðini byrjaðu uppá seinna hálvleik, meðan VB ikki skapti tað stóra.

Men brádliga bragdaði hjá vágbingum. Kári í Lágabø royndi seg við skoti, og eftir at Magnus Poulsen hálvbjargaði, var Sigmund Mikkelsen fyrstur á bóltinum og trillaði hann í tóma málið til 1-1.

VB kom eftir hetta meiri inn í dystin, men so kom avgerandi málið, og var tað ein sonn perla. Eftir at bólturin var skallaður úr VB brotsteiginum, heilfluktaði Áki Mørk bóltin beinleiðis í netið uttan nakran møguleika hjá málverjanum at bjarga, og so var 2-1 til B36.

### Málmøguleikar báðar vegir

Eftir hetta tók VB seg meiri fram á vøllin, og tað einu løtuna trýstu teir veruliga havnarliðið. Eitt skot fór á tvørstongina, meðan B36 málverjin Magnus Poulsen stóð fyri eini meistarligari bjarging uppi í sjálvum málhorninum eftir eitt gott VB skot nakað uttanfyri brotsteigin.

Orsakað av VB trýstinum kom B36 eisini til fleiri málmøguleikar eftir skjótálop, men fleiri mál komu ikki, og 2-1 til B36 var eftir málmøguleikum at døma eitt rættvíst úrslit.

### Dysturin í tølum

***B36–VB 2-1 (1-0)***
1-0: Carl H. Høgnesen
1-1: Sigmund Mikkelsen
2-1: Áki Mørk

LÍF-AB 0-3 (0-1):

# So bragdaði hjá AB

**Eftir at leirvíkingar høvdu misnýtt gyltan møguleika, tóku gestirnir av Argjum av**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað hevur gingið heilt eftir vild hjá AB seinastu nógvu umførini. Nógvir skaðar og hartil hoyrandi frávera hava viðført, at liðið er dottið av einum lovandi sessi í oddinum niður móti strikuni, men leygardagin bragdaði so loksins, tá teir vitjaðu í Leirvík.

Tað var tó ikki nógv, sum bendi tann vegin, tá LÍF tíðliga í dystinum fekk brotsspark, men hetta varð misnýtt, og so kom AB spakuliga ígongd.

Og beint fyri steðgin var tað so miðvallarovastin á liðnum, Pætur Dam Jacobsen, sum kundi leggja AB á odda, og so gekk rætta vegin.

Eftir steðgin økti Hans Jørgen Djurhuus, og so kundi afturvendi Eyðun Samuelsen staðfesta 3-0 sigurin, sum eftir øllum at døma endaliga lyfti AB av botninum.

Argjamenn mugu tó ásanna, at tað so ikki verður í ár, at teir veruliga skulu gera um seg heilt uppi í gjøgn á stigatalvuni, men hóast vónirnar kanska vóru um hetta, so man tað í sjálvum sær ikki vera nøkur vanlukka fyri felagið, sum í fyrsta umført bert hevði sett sær sum mál at stabilisera seg í deildini. Tí málinum hava teir eftir øllum at døma rokkið, og so er spurningurin, hvussu nógv liðið kann gera um seg seinasta triðingin av árinum.

### Dysturin í tølum

***LÍF–AB 0-3 (0-1)***
0-1: Pætur Dam Jacobsen
0-2: Hans Jørgen Djurhuus
0-3: Eyðun Samuelsen



# Chrisitan Høgni nýtti høvdið í síðstu løtu

**Føroyski landsliðsmaðurin tykist nú hava vunnið sær pláss á sentrala miðvøllinum á Vejle liðnum, sum sunnudagin ikki megnaði at liva upp til tað, teirra áskoðarar høvdu roknað við**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað tykist sum um, at tað er við at lýsna hjá Christiani Høgna Jacobsen í Vejle. Hann hevur havt ilt við at spæla seg til álopspláss, og hann hevur havt ilt við at halda fast um plássið, sum hann í venjingardystunum fyrr í summar tóktist skula hava í høgra verjuborði.

Nú hevur hann nakrar ferðir verið á sentralum miðvallarplássi í 4–4–2 spælskipan. Fleiri ferðir hevur hann verið skiftisspælari, men sunnudagin, tá ið Vejle hevði vitjan av Skjold av Eysturbrúgv í Keypmannahavn, spældi Christian Høgni allar 90 minuttirnar á tamb.

Vónirnar hjá teimum 1269 áskoðarunum vóru góðar, tí Vejle vann næstsíðsta sunnudag óvæntaðan 4–1 útisigur ímóti Silkeborg. Men hesa ferð gekk meiri striltið. Vejle hevði onkrar møguleikar, eitt nú eftir tíggju minuttir, tá ið álopsspælarin Tommy Knudsen var um reppið at røkka fram til tvørturum sending frá Christian Høgna Jacobsen úr vinstru. Mótstøðuliðið lúrdi eftir kontramøguleikum, og tólv minuttir undan leikloki fingu teir brotsspark, sum varð umsett til mál.



*Christian Høgni fekk loksins orsøk at fegnast, tá hann í evstu løtu tryggjaði Vejle stig móti Skjold*

Vejle royndi at leggja trýst á, men vónirnar fánaðu. Tá ið seinna umfarið var 49 minuttir og 45 sekund gamalt eydnaðist. Frísparksinnlegg kom í brotsteigin, har var Christian Høgni Jacobsen hægstur og stútaði bóltin í kassan og so var liðugt. Ei undur í, at hann var dagsins maður í Vejle.

### Horsens heldur fram

Higartil hevur gingið framúr væl hjá AC Horsens, sum er oddalið, og sum hevur Johan Byrial Hansen á liðnum. Hesa ferð vóru teir á Amager, har teir settu Fremad upp á pláss. Horsens vann 2–0. Silkeborg, sum fyrr í summar flutti niður, hevur verið roknað sum besta boðið upp á uppflyting. Eftir vónbrotið á heimavølli ímóti Vejle vóru teir hesa ferð á útivølli í Randers, har heimaliðið vann 2–0.

Fredericia, sum í fjør var frammi undir uppflyting, vann 1–0 í Nykøbing Falster, HFK Sønderjyllandi, sum droymir um superliguna, vann 2–0 á Østerbro stadion ímóti B93, Køge vann 2–1 á Tingbjerg stadion ímóti Brønshøj, Ølstykke, sum er undir liðini á Horsens við tólv stigum, vann 3–2 ímóti FC Aarhus, og FC Nordjylland vann á heimavøllinum í Ålborg 2–0 ímóti B1913, sum ivaleyst aftur í hesum kappingarárinum fer at hava stórt stríð við at halda seg omanfyri niðurflytingarstrikuna.

# Lyn er orduligur fusari

**Fyri Molde var tað stórt vónbrot, at teir í síðsta minutti mistu sigurin á útivølli ímóti Stabæk**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Vikuskiftið royndist ikki væl hjá teimum báðum norsku feløgunum, sum hóskvøldið fara at spæla í UEFA CUP ímóti KÍ og NSÍ.

Mótstøðuliðið hjá NSÍ í Oslo verður Lyn. Hjá teimum og íslendska venjaranum, Teituri Þordarsyni, stendur illa til. Í fjør vóru teir leingi á odda í landskappingini, og teir endaðu á bronsuplássinum, sum bar atgongumerkini til UEFA CUP kappingina við sær. Í ár eru teir í niðurflytingarvanda.

Hesa ferð vóru teir í Aalesund, har heimaliðið vann 2–0. Tað var fyrsti sigurin í Tippuliguni hjá Aalesund, og teir vóru so mikið fegnir, at teir tosaðu um, at 24. august nú skal gerast til flaggdag í býnum! Eftir at tað hevur gingið striltið hjá Aalesund og niðurflytingin hevur verið sera sannlík, tykjast teir nú at vera um at fóta sær.

Molde spældi á útivølli ímóti Stabæk. Tað tóktist sum um mótstøðuliðið hjá KÍ á Svangaskarði hósdagin skuldi fáa øll stigini, men tað kiksaði í síðstu løtu, tá ið heimaliðið javnaði til 1–1. Bæði í Molde og í Lyn verður nógv tosað um, at teir skulu keypa nýggjar spælarar. Serliga venda teir sær ímóti Íslandi, har landskappingin verður liðug um ein mánað.

Rosenborg er framvegis sera sannførandi oddalið, og teir í Tróndheimi tóktust leygardagin, tá ið teir høvdu vitjan av Viking úr Stavanger, lítið darvaðir av, at teir í annaðkvøld skulu spæla sera týdningarmikla uppgerð í Europa Cup í Spania. Rosenborg vann 4–1 ímóti Viking, sum er á fimta plássinum.

Bodø/Glimt er framvegis næstfremst. Hesa ferð vóru teir á útivølli ímóti Bryne, sum legði rygg til 2–0 tap. Hjá Lillestrøm gongur tað spakuliga, og teir eru langt frá tíðini, tá ið teir á hvørjum ári vóru við í kappingini um meistaraheitið. Hesa ferð vóru teir í Tromsø, har heimaliðið vann 2–0.

Sogndal er framvegis við í kappingini um altjóða atgongumerkini. Í hesum umfarinum skuldu teir í gjárkvøldið spæla í Bergen ímóti Brann. Sogndal er nummar fýra.

# Nú er Esbjerg oddalið

**Í Danmark verður tað hildið at vera vánaligt skoðsmál, tá ið oddaliðið verður sagt at spæla Drillo fótbólt**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Stóra uppgerðin í bestu donsku deildini var hesa ferð í Brøndby, har FCK vitjaði. Teir høvdu roknað við, at øll setrini fóru at verða upptikin. Tað vóru tey ikki, men teir 20.965 áskoðararnir syrgdu sum altíð, tá ið hesi bæði liðini bresta saman, fyri góðum karmi.

Tað gekk, sum tað plagar at ganga. Tað var intenst og spennandi, og tað vóru málmøguleikar báðar vegir. Málverjarnir vóru í brennideplinum, tá ið teir í 2. hálvleiki báðir stórbjargaðu.

Akkurát sum í gulldystinum á sama vølli mitt í juni, so vann FCK 1–0. Málið skoraði Jörgen Pettersson miðskeiðis í 2. hálvleiki. Talan var um eitt flott mál, men Brøndby verjan iðraði seg yvir mistakið, sum gav FCK møguleikan.

Miðverjin og liðformaðurin, Per Nielsen, og vinstri vongverjin Auri misskiltu hvønn annan, svenski miðvallarin streyk avstað við bóltinum, og tá ið Brøndby málverjin kom út ímóti, var sviin nóg kaldur at draga framvið honum og síðani at trilla bóltin í málið.

Jörgen Pettersson var komin á vøllin, tá ið ein góður hálvur tími var farin. Hann loysti skadda Erik Mykland av.

Todi Jónsson var saman við Zuma í FCK álopinum. Aftur hesa ferð stóðu teir sterkir í myndini og fingu góð skoðsmál. Todi var á vøllinum í ein tíma, so kom Peter Møller inn fyri hann. Møllarin hevði risa møguleika at økja um leiðsluna í síðstu løtu. Brøndby legði lítið í verjupartin, og Peter Møller var púra leysur eftir innlegg úr vinstru, men lobbarin upp um málverjan heilkiksaði.

Jón Rói Jacobsen, sum mikukvøldið var besti føroyski spælarin ímóti Íslandi, var ikki millum teir fimtan spælararnar, sum mannaðu besta hópin hjá Brøndby.

### Esbjerg á toppinum

Nýtt oddalið í superliguni er Esbjerg. Sunnudagin høvdu teir vitjan av AaB, sum ikki hevur staðið seg so væl í ár, men sum eftir 1. hálvleik var á odda 1–0. Í seinna umfarinum var eingin ivi, og Esbjerg vann 3–2. AaB minkaði ikki um munin fyrrrenn í síðstu løtu.

Fótbóltslagið í Esbjerg er sjálvandi gott, og tað verður mett, at Esbjerg hevur møguleikan at vera við í stríðnum um heiðursmerkini, sjálvt um tað verður mett ivasamt, um teir eftir 33 umfør fara at vera frammanfyri FCK og Brøndby. Danska pressan skýrdi Esbjerg avrikið ímóti AaB at líkjast Drillo fótbólti. At siga soleiðis í Danmark er sera niðursetandi. Tað verður ikki hildið nógv um norskan fótbólt í Danmark, og serliga tað slagið av fótbólti, sum norska landsliðið spældi, tá ið Erik Drillo Olsen var venjari, er mest sum bannlýst í Danmark.

Hvat onnur siga leggja teir ivaleyst lítið í í Esbjerg, har teir í fremstu røð hava ungar og rættuliga dugnaligar spælarar.

Eitt annað lið, sum rættuliga er farið at gera um seg, er FC Midtjylland. Eftir at teir høvdu keypt fleiri spælarar í summar varð roknað við, at tað skuldi ganga væl. Fyrstu umførini hava verið trilvandi, men nú tykist gongd rættuliga vera komin á. Hesa ferð vunnu teir 2–1 á OB, sum tykist vera steðgað upp.

### Mørch líkist sær sjálvum

Undan kappingarbyrjan varð Frem roknað millum evnini at flyta niður. Men uppflytararnir úr Valby hava higartil staðið seg væl. Frem venjari er Ole Mørch, sum fyri trimum árum síðani var við til at vinna DM saman við Jákupi Mikkelsen og Herfølge. Eftir gongdini í fimm teimum fyrstu umførunum, so tykist tað sum um, at hann ætlar at endurtaka góða úrslitið við undirtippaðum liði.

Frem var hesa ferð á vitjan í Farum, har bronsuvinnararnir í FC Norssjælland løgdu rygg til 3–1 tap. Talan var um triðja sigurin á rað hjá Frem, sum nú er á fimta plássi. Viðmerkingin hjá Ole Mørch var, at nú resta teimum 25–26 stig, áðrenn teir kunnu vera fullvísir í, at teir ikki fara at flyta niður aftur. Frem skal sunnudagin spæla ímóti AB, og tað roknar Frem venjarin við verður sera torfør uppgáva.

AB er undir niðurflytingarstrikuni saman við Herfølge. Liðini møttust á gamla heimavøllinum hjá Jákupi Mikkelsen, og AB vann 2–0. Harvið býttu feløgini um pláss, soleiðis at tað nú er Herfølge, sum er aftast.

AGF liggur framvegis tungt í sjónum. Hesa ferð vóru teir í Viborg, har heimaliðið, sum ikki hevur verið so sannførandi higartil, vann 1–0. Bæði liðini høvdu stórar møguleikar at skjóta fleiri mál.